Menn frá Ocean Warrior handtiknir

Um ellivu tí›ina mánakvøldi› vór›u tríggir av manningini á Ocean Warrior og ein hálendskur bla›ma›ur handtiknir, tá teir royndu at koma í land í Havn

JOHN JOHANNESSEN

»Please stop killing the whales«, seg›i Frank Tinkle, stjóri og pressutalsma›ur, tá hann var› handtikin Mynd: Eirikur Lindenskov

Pressutalsma›urin umbor› á Ocean Warrior, tveir a›rir av manningini og ein hálendskur bla›ma›ur vór›u um ellivu tí›ina mánakvøldi› handtiknir, tá teir komu í land í Havn.

Menninir fóru um tíggju tí›ina av Ocean Warrior í tveir lítlar gummibátar mi›skei›is í Nólsoyarfir›i. Gummibátarnir vóru lítlit og høvdu ongan motor. Tí klára›u menninir ikki at vinna upp land sjálvir.

Sjónvarpi›, sum skjótt var á sta›num, bo›a›i løgreglguni frá. Men av tí, at løgreglan ongan bát hev›i, heitti hon á Sjónvarpi› um at hjálpa monnunum til lands.

Ein tíma seinni, kom báturin, Sjónvarpi› hev›i leiga›, inn í n‡ggja havnalagi› í Havn vi› bá›um gummibátunum upp á sleip.

Fyri monnunum stjó› væl manna› løgverjuli› og hópur av tí›indafólki.

Eggja til uppreistur

Á›renn løgreglan kom upp í leikin sluppu menninir frá Ocean Warrior at tosa vi› tí›indafólkini.

– Vit eru ikki komnir her fyri at provokera, men bert fyri at fáa at vita, hví tí›indafólkini umbor› á Ocean Warrior ikki sleppa í land, seg›i Frank Trinkle, pressutalsma›ur. Hann vísti á, at felagsskapurin, Sea Shepherd, í øll tey 23 árini, hann hevur virka›, aldri hevur skatt naka› menniskja. Tí heldur hann ta› vera burturvi›, tá løgreglan sigur tí›indafólkini umbor› á Ocean Warrior vera vandamikil, bert tí tey eru vi› skipinum.

Frank Trinkle seg›i seg meta atbur›in hjá løgregluni eggja til uppreistur umbor› á Ocean Warrior, og hetta heldur hann vera í andsøgn til allar heimsins sjóreglur.

Frank Tinkle seg›i seg eisini fara at krevja at fáa skrivliga at vita frá løgregluni, hvat brotsverk hann hevur framt, so hann ikki kann koma í land í Føroyum.

Løgreglan kravdi at síggja samleikaskjølini hjá monnunum, men tók kortini allar menninar vi› á løgreglustø›ina. Teir vóru undir var›haldi, bo›a›i løgreglan teimum frá.

Enn í var›haldi

Tá Sosialurin á middegi í gjár var í sambandi vi› løgreglustø›ina í Havn á middegi í gjár, fingu vit at vita, at menn frá Ocean Warrior enn vóru í var›haldi á stø›ini.

Ta› bar kortini ikki til at fáa at vita, um nakar teirra var leyslatin ella skuldi leyslatast. Heldur ikki bar til at fáa at vita, um nakar av monnunum ver›ur sendur av landinum.

Sosialurin skilir tó, at John Videl, frá ensku avísini, The Guardian, helst skuldi latast leysur einafer› seinnapartin.

John Videl var› handtikin, tá hann seint mánakvøldi› úr skjóttgangandi gummibáti var› settur í land av Ocean Warrior í Vestmanna.

Mynd: Eirikur Lindenskov

Løgreglan ba› um at fáa pappírini frá monnunum á Ocean Warrior

Finna ongan hval

Hóast framkomna útger› hevur ta› enn ikki eydnast Paul Watson og manning hansara at bera eyga› vi› nakran grindahval í Føroyum

JOHN JOHANNESSEN

Paul Watson og manning hansara hava ikki bori› eyga› vi› nakran hval sí›ani tey komu til Føroya tí›liga fríggjamorgunin.

Umbor› á Ocean Warrior hevur Paul Watson framkomna lurtiútger›, i› kann sta›festa, hvar grindhvalir fer›ast í stórari fjarstø›u. Paul Watson sigur útger›ina vera so gó›a, at hann, tá hann liggur í Nólsoyarfir›i kann hoyra hvalir kring allar Føroyar, undantiki› kring Su›uroynna.

Men enn hevur ta› ikki eydnast Paul Watson at hoyra naka› ljó› frá hvali vi› útger›ini.

Tá Sosialurin í gjár tosa›i vi› Paul Watson lá hann í ein útnyr›ing úr Vágum vi› Ocean Warrior og leita›i eftir grind. Hann lá tá innanfyri territorialmarki›. Hann lá á 62,1 stigum nor›ur og 7,3 stigum vestur.

Men Paul Watson metir ta› ikki vera naka› brotsverk at liggja innan fyri territorialmarki›, so leingi Føroyingar fremja brotsverki› at drepa grind.

Paul Watson ælta›i sær í gjár ikki til lands nakrasta›ni, uttan talan var um at fylgja eini grind ella at seta fólk av.

Hóast gó›a lurtiútger›, er ta› ikki eydnast Ocean Warrior at hoyra nakran hval vi› Føroyar sí›ani hann kom til landi› Mynd: Jens Kristian Vang

Løgreglan heitti á sjónvarpsmanningina um at sleipa bátarnar vi› teimum f‡ra av Ocean Warrior til lands Mynd: Eirikur Lindenskov

Væl eydna› pressuoffensiv

Paul Watson fekk ta umrø›u, hann vildi hava, burtur úr at senda fólk í land Havn mánakvøldi›

JOHN JOHANNESSEN

Hópur av tí›indafólki tók ímóti, tá f‡ra fólk av Ocean Warrior um ellivu tí›ina mánakvøði› komu í land frá tveimum gummibátum í n‡ggja havnalagnum í Havn.

Hetta var júst ta›, skiparin á Ocean Warrior og lei›arin fyri umhvørvisfelagsskapin, Sea Shepherd, Paul Watson, hev›i ætla›, tá hann um tíggu tí›ina setti teir f‡ra menninir út í tveir lítlar gummibátar í Nólsoyarfir›i.

Ta› var ein bátur frá Sjónvarpi Føroya, i› sleipa›i menninar til lands. Skótt komu eisini umbo› fyri a›rar mi›lar – bæ›i føroyskar og útlendskar – á sta›i›. Tá var pressutalsma›urin hjá Sea Shepherd, Frank Trinkle, skjótur at n‡ta høvi› til at fáa or› á mi›larnar. Hann greiddi frá, at einasta endamáli› vi› fer›ini er at verja hvalirnar. Tí dugdi hann ikki at skilja, at føroyska løgreglan s‡tir fjølmi›lafólki frá Ocean Warrior at koma í land í Føroyum.

Tá menninir komu í land í Havn stó› stórur ri›il av tí›indafólki fyri teimum, og n‡ttu teir tá aftur høvi at grei›a frá, hvussu illa føroyska løgreglan, eftir teirra fatan, fer vi› teimum.

Endutók seg sjálvan

Sosialurin tosa›i vi› pressutalsmannin hjá Sea Shepherd, Frank Trinkle, me›an hann lá í gummibátinum á veg inn á Havnina. Hann gjørdi greitt, at hann bert var komin til Føroya í fri›arørindum, og at hann tískil ikki dugdi at skilja, hví løgreglan skuldi meta øll umbor› á Ocean Warrior sum brotsmenn.

Hóast vit royndu dúgliga at spyrja Frank Trinkle, um hann rokna›i vi› at fáa naka› burturúr at koma í land í Føroyum, latst hann sum hann ikki hoyrdi spurningarnar og helt fram vi› síni einarø›u, i› tóktist ógvuliga innlærd.

Tá menninir umsí›ir komu í land í Havn og heimspressan stó› fyri teimum, var Frank Trinkle skjótur at taka or›i›. Hann endurtók ta›, hann seg›i vi› okkum úti í Nólsoyarfir›i næstan or›arætt. Hetta vísti, at ma›urin var væl fyrireika›ur at møta tí›indafólkunum, og at hann væl og vir›iliga hev›i lært seg, ta› hann skuldi siga, uttanat.

Paul Watson váttar fyri Sosialinum, at endamáli› vi›, at teir f‡ra menninir vór›u settir í land í Havn mánakvøldi› var at fáa umrø›u í heimspressuni.

Handtiknar stjørnur

Skiparin á Ocean Warrior sigur, at teir bá›ir av manningini á skipinum, sum mánakvøldi› vór›u handtiknir saman vi› Frank Trinkle, pressutalsmanni, eru kendir skemtarar úr Hálandi. Tí væntar Paul Watson, at handtøkan fer at fáa umrø›u.

Um menninir ver›a leyslætnir ella ikki, tykist Paul Watson ikki hava so stóran áhuga fyri. Hann sigur, at hetta fullkomiliga stendur upp til Føroysku løgregluna.

Ynskja fleiri fólk frá Ocean Warrior sær í land í Føroyum, er Paul Watson fúsur at sigla inn vi› teimum, hóast hann hevur fingi› forbo› fyri at koma inn um føroyska territorialmarki›.

Rættiliga nógv fremmant tí›indafólk tóku ímóti á bryggjuni, tá menninir frá Ocean Warrior komu í land Mynd: Jonhard Hammer